## VALGREINAR

# Skjótt er ófødddum at bæsa

**Eftir at Immi Dam trýsti á startknøttin í fosturtøkumálinum eru Kristian Magnussen og miðflokkaungdómar farnir at senda í stereo. Ein øgilig skurvblanding. Og tað er sannleikavirðið ikki vorðið størri av. Tú kanst bera yvir við einum dulnevndum ungdómsfelagsskapi, ið heldur seg einsamallan stríðast fyri eini rættari sak, meira eigur tó at kunna krevjast av einum tingmanni, ið hevur sitið á løgtingi í tíggju ár. Í hvussu er, at hann stríðist við reinum vápnum tá ið hann fer í politiskt víggj**



**Tórbjørn Jacobsen,**
*fólkatingsmaður*

Naser hader og Tjóðveldisflokkurin hava einki við hvønn annan at gera, soleiðis sum Kristian Magnussen roynir at geva eina ábending um í Dimmalætting tollaksmessudag. Khader umboðar Radikala vinstraflokkin á Fólkatingi og skuldi harvið verið politiskt meira slektaður við gamla sjálvstýri - heldur enn nakran annan flokk í Føroyum. Hesum fingu vit eisini ein varhuga av fyri kortum, tá ið Kenneth Rasmussen boðaði frá nýggja politikkinum hjá yngra ættarliðnum í Sjálvstýrisflokkinum. Floksformaðurin gav honum eitt álvarsligt nefs í bløðunum, men Kenneth er væl hann ið koma skal, so væntandi er, at tað verður eitt gamalt sjálvsstýrið í øðrum og heilt nýggjum hami, ið kemur undan kavi, eftir valið 20. januar komandi.

Tað var annars Bill Justinussen, sum byrjaði alt hetta humbukkið í donskum fjølmiðlum. Viðmerkingarnar síðani liggja allar í slóðini frá honum. Eisini tær hjá Kristiani. Løgið, at ein andstøðutingmaður ígjøgnum seks ár onki annað hevur á hjarta og at bjóða sínum veljarum, ein slakan mánað fyri valið, enn tað at fara uppí hetta til høvið produseraða miðflokkagruggið í donskum og føroyskum fjølmiðlum? Skal ikki leggja honum ráð, men hugsaði at hann kanska heldur fór at taka aftur í aftur seinasta tingdagin fyri jól, tá ið landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Anfinn Kallsberg, og ditto hansara í trivnaðarmálum, Bill Justinussen, við totalari arrogansu, í tveimum syftum, royndu at dylja fyri løgtinginum at teir høvdu brúkt 7,1 millión krónur við ongari játtanarheimild. Spell at fjølmiðlarnir vóru farnir í vikuskiftisfrí, nú tá ið teir báðir bókhaldararnir smeltaðu niður sum tvey kjarnorkuverk. Var ikki politisk undantaksstøða í landinum, hevði meginparturin av løgtinginum syft teir burtur frá radiatorunum úti í Tinganesi hendan dagin. Og hvat við rossahandlinum hjá Kára P. Højgaard og Óla Breckmann hendan sama dagin? Hví mundi hann vera íkomin? At halda í teymarnar á teimum ið við valdinum sita, at vera ein agressivur politiskur varðhundur, skuldi eisini verið ein fornemm andstøðuuppgáva? Ella rættari, ein neyðug uppgáva hjá øllum teimum ið eru vald til at forvalta løggevandi valdið. Men tað er so eiðasørt, og forrestin, hví brúkar Kristian ikki heldur sína politisku orku til at siga føroyingum frá síni og javnaðarfloksins støðu til fosturtøkumálið, heldur enn at villeiða fólk um hvatið hann heldur at undirritaði nú einaferð meinar um bæði hetta og hatta?

Hvørjum málum Bill annars ætlar sær at røkka, við at úttala seg sum hann ger, í útlendskum bløðum, tað kann bara Várharra vita. Í næstan hálvthundrað ár hevur sama fosturtøkulógin verið galdandi í Føroyum. Lítil ella eingin mótstøða hevur verið ímóti tulkingini av lógini øll hesi árini. Ikki fyrrenn nú, tá ið Miðflokkurin hevði tørv á eini politiskari nitju, vera føroyskir læknar mistonktir fyri »óneyðug« fosturdráp av ráðharra sínum. Hann ætlar sær sjálvur at hertaka læknamiðstøðirnar, at gerast ein partur av praksis hjá kommunulæknunum. Hetta kemur sjálvandi ikki óvart á nakran, hann boðaði longu frá hesum sama tá ið hann sessaðist sum landsstýrismaður, at hann ætlaði sær at hava eitt vakið eyga við journalunum hjá føroyskum kommunulæknum. Hann man ikki halda lítið um seg standa. Hugmóðin er fullkomin. Her er eingin virðing, eingin agi, einki álit og ongin tvívegis ábyrgd.

Hugsi at flestu føroyingar munna vera samdir við Elisabeth Thorsteinson tá ið hon sigur við Linu Prasz tíðindakvinnu á Politiken: »Det er en helt utrolig anklage mod os. Jeg synes ikke, vi skal have fri abort, men man bliver da nødt til at tage sociale hensyn. Desuden ville det i et lille samfund som vores være et brud på tavshedsløftet, hvis vi skal til at vise Bill Justinussen hver enkelt begrundelse for at få foretaget abort.«

Tá ið undirritaði var spurdur av Linu Prasz hvat ið eg sum fólkatingsmaður kundi gera við málið, varð svarað, at einasti møguleiki kundi verið at spurt avvarðandi ráðharra í donsku stjórnini, hvussu hann hevði stillað seg, skuldi Bill í einingi gjørt álvara av síni fundamentalistisku kós í hesum máli. Tað er ein loddrøtt lygn tá ið Kristian Magnussen leggur meg undir at hava ætla mær inn á Danating fyri at fáa danir at hjálpa til við at liberalisera føroysku fosturtøkulógina. Og reingingin í dulnevnda brævinum hjá ungum fyri Miðflokkin er ikki lakari tá ið tey siga: »Okkara« umboðsmaður á Christiansborg, ímyndin fyri føroyskari loysing, var noyddur at leita sær hjálp frá dønum, fyri at finnast at rikna fosturtøkupolitikkinum í egnari samgongu…«

Undirritaði hevur ikki leita sær nakra hjálp í hesum máli. Málið er ikki tikið uppá tungu á Danatingi. Og sjálvt um tað helst er neyðugt við eini dagføring av eini hálvthundrað ára gamlari lóg, og neyðugt at skipa viðurskiftini undir føroyskari lóggávu, so taki eg als ikki undir við eini liberalisering av regluverkinum um fosturtøku. Heldur ikki eini herðing. Ber tað til á skilvísan og sosialt rættvísan hátt at minka um talið av fosturtøkum í Føroyum, tá eigur tað sjálvandi at vera miða ímóti tí, sum tað eisini stendir skrivað í einum samgonguskjali, ið nú er søga. Soleiðis sum »danska« lógin frá 1956 hevur verið tulkað og soleiðis sum siðvenjan er vorðin, er prinsippið í lóggávuni helst tað sum føroyingurin ynskir at liva við. Eisini í framtíðini. Skjótt er óføddum at bæsa. Tí krevst eitt greitt og magnfult lógarverk, ið verjir tey óføddu so væl sum yvirhøvur gjørligt. At kóka politiska suppu úr, og skapa klandur um eitt so eymt mál sum hetta, tað er monnum til lítlan sóma. Hetta vera míni seinastu orð um fosturtøkumálið á hesum sinni, og eg frábiði mær nýggjar yvirtulkingar og at ósannindi verða løgd mær í munnin. Hetta er eisini galdandi fyri onnur enn Kristian Magnussen.

Tað verður hópurin av málum at loysa hjá teimum ið koma sær inn um tinggátt eftir løgtingsvalið, latið okkum fáa boðini um hvussu menn ætla sær at stjórna landinum, heldur enn at leita við ljós og lykt eftir trupulleikum, sum eru ørsmáir og sum meinigi maðurin at kalla er samdur um. Farið valla skeivur tá ið eg sigi at meginparturin av føroyska fólkinum er samt um fosturtøkupolitikkin. Meina at hann skal vera á leið sum hann er. Eitt lítið fátal tekur undir við fríari fosturtøku, ímeðan ein annar marginalbólkur brúkar ella kanska heldur misbrúkar fosturtøkuspurningin sum beitu í eini desperatari roynd eftir politiskum valdi.


# Blaðfólk

Á høvuðsredaktión okkara á Argjum er eitt spennandi, avbjóðandi og fjøllbroytt starv sum blaðfólk leyst.

Starvið fevnir fyrst og fremst um at røkja uppgávur á høvuðsredaktiónini, men møguleiki er tó eisini fyri uppgávum kring landið, har vit hava lokalredaktiónir í Klaksvík, Sandavági, Sandvík og við Saltangará.

Vit hugsa okkum, at tú skalt byrja í starvinum 1. februar komandi, men er tað ynskiligt, er møguleiki eisini at byrja fyri hetta.

Vit rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært sáttmála millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller á telefon 341 800. Ella á teldupostadressuni, jan@sosialurin.fo.

Seinasta freist at søkja starvið er mánadagin, 19. januar, og skulu umsóknir við viðkomandi upplýsingum sendast til:

**Sosialurin**
Jan Müller
Postsmoga 76
100 Tórshavn

Sosialurin

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umfram tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið.
Á Sosialinum starvast í dag umleið 30 fólk.


# Ógildislýsing

## Mortifikatión

Fráboðað er Føroya Lívstrygging, at niðan fyri nevndu tryggingarskjøl eru burturblivin

| | |
|---|---|
| 14-682 | Jákup Herji Hermansen |
| 14-699 | Jens Pauli Poulsen |
| 14-5850 | Eyðun Johannesen |
| 14-6110 | Áki Danielsen |
| 14-6877 | Egil Petersen |
| 14-6918 | Eyðun Johannesen |
| 14-530027 | Jóngerð J. Purkhús |
| 14-800001 | Anna Tordis Andreasen |
| 14-800004 | Tordis Mohr |
| 14-800011 | Hanus Petersen |
| 14-800012 | Johannes A. Ellingsgaard |
| 14-800014 | Kára Wacher |
| 14-800022 | Sólrun Jacobsen |
| 14-800023 | Hans Jørn Nielsen |
| 14-800024 | Marianna Clementsen |
| 14-800027 | Katrin Fossdalsá |
| 14-800028 | Sigbrand Johansen |
| 14-800034 | Dóris Nolsøe |
| 14-800039 | Frígerð Jacobsen |
| 14-800042 | Arnhold Fjallsstein |
| 14-800047 | Aksel Poulsen |
| 14-800048 | Meinhard S. Hentze |
| 14-800051 | Oddbjørg Olsen |
| 14-800053 | Sonja Joensen |
| 14-800054 | Jóna Mortensen |
| 14-800063 | Helgi Skorá |
| 14-800071 | Elin Danielsen |
| 14-800078 | Anna Gøthe |
| 14-800081 | Jákup P. M. Mortensen |
| 14-800106 | Inga Joensen |
| 14-800109 | Korinta Jarnfoss |
| 14-800150 | Sólbjørn Skoubo |
| 14-800170 | Heidi Poulsen |
| 14-800174 | Marianna J. Eystberg |
| 14-800186 | Sunnvør Niclasen |
| 14-800187 | Rannvá Skála |
| 14-800188 | Sofía Højgaard Poulsen |
| 14-843316 | Brandur Øssursson |
| 14-870467 | Jóhanna Joensen |
| 14-870578 | Beinta Poulsen |
| 14-870664 | Oddvør Olsen |
| 14-870677 | Birna Dahl |
| 14-870685 | Thomas Dam |

Tey, ið møguliga hava nevndu tryggingarskjøl í hendi, verða biðin at prógva ognarrætt sín áðrenn 6 mánaðir eru farnir.

Prógvar eingin ognarrættin, áðrenn nevndu tíðarfreist, verða skjølini søgd ógildug og nýggj tryggingarskjøl verða útskrivað.

*Tórshavn,*
*tann 31. desember 2003*

**P/F FØROYA LÍVSTRYGGING**



# Reingerðarfólk til Verkstaðið Vón!

Verkstaðið Vón søkir hervið eftir einum reingerðarfólki, at arbeiða 20 tímar um vikuna. Starvið verður sett skjótast tilber og er lønt sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðskvinnufelag og Arbeiðsgevarafelagið.

Verkstaðið Vón er ein vardur verkstaður og er dagliga karmur um arbeiðslívið hjá uml. 40 vaksnum menningartarnaðum og starvsfólkum teirra.

Á staðnum er dagliga stórt og fjøltáttað virksemi millum kl.8.00 og 16.00.
Arbeiðstíðin hjá reingerðarfólkinum verður sostatt uttanfyri hesi tíðarbil.

Umsøkjarin skal vera fleksibul og hava áhuga fyri at arbeiða á einum arbeiðsplássi í støðugari menning, og skal somuleiðis vera røkin og lættur at samstarva við.

Skrivlig umsókn skal verða leiðaranum, Maud Wang Hansen,

**Verkstaðið Vón**
**Box 2003**
**Fo 165 Argir**

í hendi í seinasta lagi 14. januar 2004.

# Havnarmeistari til Leirvíkar kommunu

Leirvíkar Kommuna arbeiðir við at betra um umstøðurnar á havnarøkinum og á bingjuplássinum.

Munandi útbyggingar verða framdar av havnarøkinum komandi árini, samstundis sum ætlanin er at økja um viðlíkahaldið og eftirlitið við havnarøkinum, sum fevnir um økið innanfyri grótkastið við ferjuleguna til grótkastið á Kráartanga.

Frá fyrst í komandi árið verður bingjuplássið skipað sum endurnýtslupláss í IRF-skipanini og skal plássið tí vera mannað, tá ið tað er opið.

Leirvíkar kommuna søkir tí eftir einum havnarmeistara at arbeiða fulla tíð frá 01. mars 2004 ella skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávurnar eru:**
- Viðlíkahald og eftirlit við øllum havnarøkinum, bátahylinum og øllum bátadráttum v.m.
- Umsjón við bingjuplássinum og vera á plássinum, tá ið opið er.

**Royndir:**
- Royndir innan arbeiðsmarknaðin
- Hava eina viðkomandi útbúgving.

**Lønarviðurskifti:**
- Løn sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Skrivlig umsókn við avritum av møguligum prógvum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi **mánadagin 12. januar 2004.**

Kommunan tilskilar sær rætt til frítt at velja millum umsøkjararnar ella ongan at taka.

**Leirvíkar Kommuna**
Postrúm 42 · 520 Leirvík

# Fíggjarleiðari til Gøtu kommunu

Søkt verður eftir fíggjarleiðara at arbeiða til Gøtu kommunu skjótast gjørligt.

**Høvuðsábyrgdarøkið verður:**
- Fíggjarstýring
- Ábyrgd av bókhaldi
- Journalisering
- Fólkayvirlit
- Aðrar fyrifallandi uppgávur

**Útbúgving:**
- HH, Merkonom (roknskap) ella líknandi
- Góðan kunnleika til EDV
- Umsøkjarar við royndum innan økið hava fyrimun.

**Persónligir eginleikar:**
- Ágrýtin og kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Góðir eginleikar at samskifta við onnur
- Góð samstarvsevnir

**Setanarviðurskiftir:**
- Løn sambært sáttmála ímillum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið
- Talan er um fulltíðarstarv.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 441012.

Umsókn við prógvum og viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mikudagin 21. januar 2004 kl. 12.00.

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja ímillum umsóknirnar ella onga at taka.

Götu Kommuna

# Kunngerð

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at almennu bygdarráðsfundirnir í 2004 verða hildnir í skúlakjallaranum hesi hóskvøld, kl. 19.00.

- 22. januar
- 19. februar
- 18. mars
- 22. apríl
- 27. maj
- 17. juni
- 19. august
- 23. september
- 21. oktober
- 18. november
- 09. desember

*Oyndarfjørður, tann 31. des. 2003*

**Oyndarfjarðar bygdaráð**

# Almennir kommunustýrisfundir 2004

| | |
|---|---|
| 26. januar | 30. august |
| 23. februar | 27. september |
| 29. mars | 25. oktober |
| 26. apríl | 15. november |
| 27. mai | 29. november |
| 28. juni | 13. desember |

**Sjóvar kommuna**


Spf. CARRO BILVERKSTAÐUR
360 SANDAVÁGUR



4 stk. VW Golf 1.9 SDI Stationcar
· Diesel
· Allir árgang november 2000
· Koyrt millum 91.000 og 112.000 km.
· Sera væl hildnir

Prísir úr 139.500,- við MVG

TEL 21 25 51

FLEIRI BILAR ERU AT SÍGGJA Á:
www.carro-bilar.com

Sosialurin 341800

VARPIÐ
Skráir og ummælir Hvønn fríggjadag
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2